# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Esther Nielsen**
ættað úr Norðragøtu

doyði.
Takk til tykkum, sum sýndu samkenslu við blómum og heilsanum, og tykkum, sum vóru til minningarhald í Gl. Holte Kirke og aftaná á Hotel Tórshavn.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jørgen, Lonni, Tonny, Jeannette og Tommy**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Solveig Olsen**
Svínoy

andaðist og varð jarðað.

Takk til Heina Marknagil, Tróndur Eysturstein, Poul Færø og Essa Petersen fyri troystarrík orð. Takk til gravarar og øll, sum hjálptu til við ervinum. Ein tøkk til Niðristovu. Tøkk til tykkum, sum lótu gávu til Akurin og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Hanus, Ásmund, Regin og Marjun**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Håkon Jacobsen**

andaðist og varð jarðaður.
Vit takka Sonju Klein fyri troystarrík orð í heiminum og kirkjuni.
Takk fyri blómur og kransar.
Takk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Marja, Elin og Rúna v/ familju**

# Jógvan við Keldu 65 ár

Fríggjadagin 30. januar fyllir Jógvan við Keldu í Klaksvík 65 ár.

Jógvan er best kendur sum handilsmaður, kórleiðari, og politikari. Hann er klaksvíkingur, sonur Giggu, ættað av Kirkju, og Theodor við Keldu, ættaður úr Leirvík. Gigga og Theodor fingu trý børn: Regin, Jógvan og Ásla.

Jógvan rak í mong ár heilsøluna Theodor við Keldu í Klaksvík, sum m.a. seldi kolonialvørur, skrivimaskinur, frystidiskar, kassaapparat og vektir. Fyritøkan seldi eisini maskinur og bilar undir navninum Faroediesel, ið vóru teir fyrstu sum seldu Mitsubishi bilar í Føroyum. Jógvan var eisini við til at skipa fyri fyrstu vørumessunum í Føroyum.

Í 1970 varð Jógvan fyrstu ferð valdur í Klaksvíkar býráð. Hann var býráðsformaður í Klaksvík frá 1981 til 1998 og frá 1993 til 2002. Jógvan var fyrstu ferð valdur á ting fyri Fólkaflokkin í 1988, tá hann sat í tvey ár. Tíggju ár seinni, í 1998, varð hann aftur valdur á ting. Hann hevur eisini verið landsstýrismaður í m.a. innlendismálum fyri flokkin.

Jógvan hevur eisini havt nógvar nevndarsessir sum t.d. í Norðurlandaráðnum og í Klaksvíkar Sjúkrahúsi, har hann eisini hevur formaður í stýrinum. Í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum hevur umboða Føroyar á ST aðalfundi.

Jógvan hevur verið kórleiðari hjá sangkórinum í Betesda í Klaksvík í meira enn 40 ár, umframt at hann hevur skipað fyri øðrum tónleikaligum tiltøkum sum t.d. Seytjan sangarar. Jógvan hevur eisini komponerað tónleik, sett út og yrkt sangir.

Í 1965 giftist Jógvan við Betty Skaale av Toftum, tey eiga trý børn: Gunvá, Pætur og Tóra.

*-red*



Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

# Spírandi list í Smiðjuni



*Hesi sýna fram málningar í Smiðjuni í døgunum 29. januar til 3. februar*

Hósdagin 29. januar læt upp listaframsýningin "Spírandi list", hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla, í Smiðjuni í Lítluvík.

Talan er um eina framsýning hjá næmingum á byrjunarstøði. Á framsýningini eru 50 málningar, teir flestu er vatnlitsmálningar og nakrir oljumálningar.

Talan er um 9 næmingar sum sýna fram, tey eru: Jákup Lervig, Kristina Lervig, Miriam V. Egholm, Anna Eilifsdóttir, Helle Drews, Lisa Hendriksdóttir, Dianna Hentze, Inga Samuelsen og Jórun Mouritsen. Lærari hjá næmingunum er Randi M. Gunnarsdóttir.

Framsýningin verður opin til týsdagin 3. februar. Opið er allar dagar frá kl. 14-18, tó leygardagin frá kl. 10-18.

Ein onnur framsýning hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla heldur fram frá 3. til og við 11. februar við nøkrum øðrum royndum listarfólkum.

*mg*